# Eli Smith í Snarskivuni

**Eli Smith er royndur og eisini sermerktur listamaður, ið seinnu árini hevur lagt seg eftir at mála við føroyskum litum, ið hann væl at merkja sjálvur framleiðir úr føroyskum gróti. Eli fyllir 50 ár sunnudag-in og framsýningin, sum hann í løtuni hevur í Snarskivuni í Havn, er partvís fyri at seta ein varða við dagin**

LIST

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Eli Smith sýnir í hesum døgum fram í Snarskivuni.

- Sýningin er partvís ein markering av, at eg nú fylli 50 ár, sigur Eli, sum fyllir 50 sunnudagin.

Eli er gamal í garði sum listamaður, men seinnu árini hevur hann lagt seg meira eftir listini og seinni árini hevur hann burturav málað. Eisini hevur hann - sum kanska hin eisnasti í Føroyum - eina rullandi málistovu. Hann hevur innrættað sær ein stóran vøruvogn til endamálið.

Myndevnini skifta, men gjøgnumgangandi er, at talan er um náttúrulýsingar. Spógvin og spógvareiður hava verið myndevni ella tema, men hann er nú farin eitt sindur frá hesum og nú eru fjallalandsløg at síggja. Ofta expressionistisk.

- Men fyri tað kann spógvin koma aftur. Eyguni síggja alla tíðina okkurt nýtt, sigur Eli Smith.

## Ger litir sjálvur

Men eitt, sum av álvara setir Eli á sína egnu hill innan føroyska málningalist, eru litirnir.

Hann ger nevniliga litirnar sjálvur. Eli hevur skrivað eina stuttsøgu, har hann sjálvur hegnisliga lýsir hendingina, ið gjørdi, at hann fekk eyguni upp fyri møguleikanum at gera og nýta føroyskar litir.

Í stuttum er søgan tann, at Eli ein dag fór til Nólsoyar í báti við familju úr Danmark. Tey skuldu setast av sunnast á oynni og ganga heim til bygdina. Á veg út legði Eli til merkis reyða litin í fjallasíðuni í Hósmøl. Nakað hann eisini hevði sæð í Suðuroynni.

Eli setir ferðafólkini av og siglir mótvegis bygdini og kemur framvið Hósmøl. Hann hevur góðar stundur, fiskar, men fær so trupulleikar við motorinum. Tað eydnast honum at koma í land á Hósmøl. Og meðan hann bíðar eftir hjálp, nýtir hann tíðina at kanna grótið nærri. Royðugrót í ymsum litum og hann takkar Guði fyri slíkar signaðar løtur í friði, og har hann so enntá eisini hevur fingið eyguni upp fyri hesum nýggja møguleika inn litevning.

Eli tekur grót við sær og vitjar fleiri ferðir aftur, og eftir nógvar royndir at framleiða litir, kemur hann fram til góð úrslit.

Soleiðis er søgan í stuttum um, hví Eli sum hin einasti í Føroyum nýtir litir úr føroyskum tilfari.

## Egyptaland

Onnur hugvekjandi søga í samband við litirnar er, at summi halda litir og list minna um myndir úr Egyptalandi og nøkur, ið hava sæð holumálningar, koma at hugsa um hesar.

- Mamma mín kom einaferð við einum endurprenti av mynd úr Egyptalandi og vit funnu útav, at hetta eru somu litir, sum eg fái fram úr føroyska grótinum, sigur Eli, sum eisini hevur spurt jarðfrøðingar, og teir meta, at møguleiga er talan um sama tilfar í litframleiðsluni.

Eli hitti herfyri fólk, sum hevði sæð holumálningar í Spania og helt teir minna ikki sørt um litir og list hjá Eli. Tí ætlar hann sær ein túr til Spania komandi ár, har holulist m.a. er at síggja.

At Eli hevur innrættað sær bil til málningaverkstað gevur honum frælsi og ótømandi møguleikar at ferðast í náttúruni, sum jú er størsti íblásturin. Honum dámar væl at koyra og ganga so mikið langt, at hann kemur burtur frá fólki, so til ber at njóta náttúru og stilli, ið har valdar.

Í løtuni er bilurin upp á Vatnaskørðum, og Eli arbeiðir í løtuni við myndum til frímerki.

## Mist

Í mong ár vóru Ólavur á Váli og Eli Smith listafelagar. Teir teknaðu, málaðu og sýndu fram í felag. Tá Eli fyri stuttum misti Ólav, svágin, var tað ein smeitur, ið kom brádliga, men soleiðis er lívið.

Í løtuni hanga 20 málningar hjá Eli Smith í Snarskivuni og teir hanga fram til 24. oktober. Til ber eisini at vitja heimasíðuna www.eli.fo


P/F ALMA Munters

Munters produktini avfukta kølirúm, frystirúm og aðrar goymslur, produktiónshølir, teknikkrúm, turkirúm, garagur, loftsrúm og kjallarar við kondenstrupuleikum, eins og onnur hølir har fukt ella kondens kann gera skaða, ella eitt turrari umhvørvi er eitt ynski ella krav.

**Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn**
**Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00**
**Mail: henrik@alma.fo**





Flogskiparar til Atlantic Airways

Søkt verður eftir flogskiparum til flogførini hjá Atlantic Airways.

Krøv
Umsøkjarar skulu hava Commercial Pilot License (CPL), hava staðið prógv til Airline Transport Pilot License (ATPL) og Instrument Rating Multi Engine (IRME).

Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. oktober 2005. Nærri upplýsingar kunnu fáast hjá Hans Hansen, flogovasta, á tlf. 21 31 72 ella e-mail: hans@atlantic.fo.

Umsókn skal sendast til Atlantic Airways, att. Hans Hansen, Vága floghavn, 380 Sørvágur.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS
www.flyfaroe.com